

KLAMYDIA-

# Hvat er tað?

www.gigni.fo

GIGNI

# Hvat er Klamydia?

## Klamydia er ein bakteria, sum er orsøkin til mest vanligu kynssjúkuna millum ung, eisini í Føroyum. Klamydia smittar við samlegu.

**Hvussu nógv hava Klamydia?**
Klamydiaátakið 2010 vísti, at av teimum sum lótu seg kannað, høvdu 7 % Klamydia, ið samsvarar væl við kanningar aðrastaðni. Hildið verður, at umleið 7. hvør ungur í Føroyum antin hevur/hevur havt Klamydia.

**Hvussu veit eg at eg eri smittað/-ur við Klamydia?**
Meira enn helvtin av mannfólkunum og 2. hvør kvinna hava Klamydia uttan nøkur sjúkueyðkenni, so einasti møguleiki fyri at vita um tú hevur Klamydia er at verða kannað/-ur.

**Møgulig sjúkueyðkenni til Klamydia hjá manninum/dronginum:**
- Útflot og skriði við urinrørið
- Svian og pína tá tú pissar
- Útflot úr endatarminum

**Møgulig sjúkueyðkenni til Klamydia hjá kvinnuni/gentuni:**
- Svian og pína tá tú pissar
- Óvanliga nógv og gulligt útflot
- Bløðing uttan at tú hevur menstruatión og bløðing eftir samlegu
- Pína í undirlívinum alla tíðina, ella møguliga bert við samlegu
- Nógva pínu í undirlívinum og fepur (undirlívsbruni)



**Hvussu kann eg finna útav um eg havi Klamydia?**
Tú kanst venda tær til læknan og verða kannað/-ur fyri Klamydia.

**Lat teg kannað um tú:**

- Hevur havt samlegu uttan at nýta hít
- Hevur tekin til at tú hevur Klamydia

**Hvat hendir um eg ikki fái viðgerð fyri Klamydia?**
Kvinnur/gentir ið ikki fáa viðgerð fyri Klamydia eru í vanda fyri at fáa álvarsligar fylgjur av sjúkuni, so sum:

- Undirlívsbruna
- Óviljað barnloysið
- Viðvarandi pínu í undirlívinum
- Graviditet uttanfyri lívmóðurina

Hjá monnunum hevur Klamydia ikki so álvarsligar fylgjur, hóast hon ikki verður viðgjørd, men kann verða ótespilig at ganga við. Hjá nøkrum førir hon tó til bruna í eistrunum.



> **Gev gætur: Tað er týdningarmikið at verða viðgjørdur, so tú ikki smittar onnur við Klamydia, hóast tú ikki merkir nakað til sjúkuna, ella ikki ert í vanda fyri, at fáa álvarsligar fylgjur av henni.**

**Er tað lætt at sleppa av aftur við Klamydia?**
Ja, sum oftast er lætt at sleppa av við Klamydia. Klamydia verður viðgjørd við antibiotika.

**Hvussu fyribyrgi eg Klamydia?**
Hítin er tað einasta sum verjir teg móti Klamydia og øðrum kynssjúkum, um tú hevur kynsligt samband, treytað av at hon verður brúkt á rættan hátt og undir allari samleguni. Somuleiðis verjir hon eisini kvinnuna/gentuna móti at gerast við barn.

**Nýtist nøkrum at vita, at eg havi Klamydia?**
Ja, tí tú kanst fyribyrgja, at núverandi ella fyrrverandi partnari hjá tær smittar onnur, tí hann/hon ikki veit at hann/hon hevur Klamydia.

Tí er sera týdningarmikið, at tú sigur við núverandi partnara, ella tann tú hevur havt samlegu við teir síðstu 6-12 mðr., at tú hevur Klamydia.

**Keldur:**
Sundhedsstyrelsen, www.sst.dk
Statens Seruminstitutt, www.ssi.dk
Klamydiaátakið 2010, Malan Egholm, Master of Public Health
Landslæknin, www.landslaeknin.fo

GIGNI virkar fyri, at børn og ung fáa eina jaliga og mennandi lívsbyrjan og heilsugóð barna- og ungdómsár!

GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 • Postboks 132 • 110 Tórshavn • Tlf. 562300